ítróttur

Nr. 163 • týsdagur • 30. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Heine hongur í sera klønum tráði

**Viðhaldsfólkini krevja, at venjarin verður koyrdur frá, eftir laku úrslitini í seinastuni. Nevndin í felagnum sigur seg onga viðmerking hava**



*HB-venjarin tóktist ikki hava neyðuga yvirskotið á Eiði sunnudagin, soleiðis at hann kundi geyla menninir upp. At kalla allan dystin varð hann sitandi á beinkinum í einum passivum eygleiðaraleikluti*

HB-VENJARIN
*Jákup Mørk*

Tað er nógv, sum bendir á, at 4-0 tapið á Eiði var seinastu dysturin, har venjarin í HB framvegis æt Heine Fernandez.

Ónøgd millum viðhaldsfólk er ikkii nakað ókent fyribrigdi, tá úrslitini ikki laga seg eftir vild. Og tó at HB støðugt hevur hildið seg frammi í oddinum hetta kappingarárið, so hevur ónøgdin støðugt verið til staðar um taktisku støðutakanirnar hjá venjaranum hetta kappingarárið. Ikki minst hevur nógv av tosinum snarað um støðugu broytingarnar av liðnum. Broytingar, sum kanska partvíst hava verið avleiddar av skaðum og leikbannum, men sum eisini hava gjørt tað trupult hjá liðnum at finna nakra veruliga rútmu í spælinum.

Seinastu vikurnar hevur annars loyala heimasíðan hjá felagnum eisini gjørt vart við hesa ónøgd. Bæði eftir reyða kortið, sum venjarin fekk í grannauppgerðini móti B36, og sum helst kostaði tvey stig tann dagin. Men eisini um taktisku dispositiónirnar hjá venjaranum til dystirnar móti ávíkavist NSÍ og EB/ Streymi.

### Rætta løtan

Tá vit mámamorgunin høvdu orðið á HB-formanninum, Birgir Enghamar, segði hann, at nevndin í løtuni ikki hevði nakra sum helst viðmerking til málið.

Og tað í sjálvum sær ber helst eisini boð um, at broytingar eru ávegis. Her hevur felagið í eina tíð arbeitt við nøkrum bygnaðarbroytingum, har verandi hjálparvenjarin, Albert Ellefsen, skal fáa ein størri leiklut, og tí kundi tað verið upplagt, at tað verður heitt á hann um at standa fyri liðnum seinastu umførini. Møguliga saman við øðrum monnum, har eitt nú Kári Nielsen kundi verið ein upplagdur møguleiki. Júst Kári var saman við Jóannes Jakobsen maðurin, sum tók við leiðsluni av liðnum seinasta partin av kappingarárinum 2002. Eitt kappingarár, sum endaði við fyrsta av teimum higartil trimum gullmerkjunum, sum HB hevur vunnið á rað.

Og skal tosast um timing, so er lítið at ivast í, at løtan til hetta er tann rætta júst nú. Enn eru seks dystir eftir at spæla í árinum, so heilt burtur er FM-møguleikin á ongan hátt. Megnar HB at endurtaka endaspurtin frá 2002 - tá teir framdu venjaraskifti í úrtíð! - so er tað á ongan hátt ósannlíkt, at felagið fjórða árið á rað kann fáa gullmerkini um hálsin.

Samstundis er talan júst nú um 14 daga steðg í landskappingini, tí landsliðið skal spæla dupult-umfar, og tað vil alt annað líka geva einum nýggjum venjara betri møguleikar at arbeiða við hópinum undan næstu uppgávuni.

### Kunnu enn avgera

Og hóast talan altíð er um truplar uppgávur, so liggur HB enn í teirri støðu, at liðið »næstan« kann avgera alt sjálvt. Avgjørdi lykladysturin í hesum er útidysturin móti Skála, sum verður 18. september, og kemur felagið úr teirri uppgerðini við trimum stigum, er væl hugsandi, at talan verður um satt gullbrak, tá B36 og HB dystast í seinasta umfarinum á árinum. Og so skal HB altso ikki gloyma, at talan eisini er um fýra av teimum »bleytu« dystunum, liðið hevur havt so stórar trupulleikar av í ár.

Men eftir øllum at døma, so verður hetta altso uttan Heine Fernandez. Fyri trimum vikum síðani gav hann sær sjálvum reyða kortið í grannauppgerðini móti B36, og eftirspælið ta ferðina kundi bent á gult kort frá leiðsluni. Nú bendir so alt á, at talan eisini verður um reytt kort til venjaran. Ein venjara, sum í fjør førdi liðið upp á tindin sum tað mest vinnandi í føroyskum fótbólti, men sum í ár als ikki hevur megnað at liva upp til framúr avrikini.

## Fakta

### Seinastu seks dystirnir hjá HB

| | |
|---|---|
| 11. september | HB-GÍ |
| 18. september | Skála-HB |
| 25. september | HB-VB |
| 2. oktober | ÍF-HB |
| 16. oktober | HB-KÍ |
| 22. oktober | B36-HB |

# Claus og Jón Rói eru ivasamir

**Í dag verður gjørt av, um tveir av teimum, sum seinastu tíðina hava verið fastir menn á liðnum, skulu við til Fraklands**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Í morgin fer landsliðið undir størstu avbjóðingina í hesi HM undankappingini. Tá fer landsliðshópurin úr Vágum og umvegis Keypmannahavn og til Fraklands, har dysturin verður leygardagin.

At fronsku heimsstjørnurnar eru væl fyri varð undirstrikað í vikuskiftinum. Zidan hevur bjóðað seg í tænastu aftur fyri føðilandið. Sunnukvøldið var spældi Real Madrid í fyrsta umfarinum á útivølli móti Cadiz. Zidan var væl upplagdur á miðvøllinum, og tað var hann, sum við genialari fríspæling var upphavið til fyrra Real Madrid málið. Eftir bragdliga byrjan og 1-0 málið, sum Ronaldo skoraði, fall Real Madrid í fátt, og teir vóru hepnir at fáa sigursmálið.

Eitt sindur av iva er um, hvørjir skulu við føroyska ferðalagnum til Fraklands. Ivin er serliga um Claus Bech Jørgensen og Jón Róa Jacobsen. Felags fyri teir báðar er, at teir seinastu tíðina hava verið fastir menn á landsliðnum, og at teir ikki spældu í vikuskiftinum.

Claus Bech Jørgensen er fyri fyrstu ferð nakrantíð plágaður av vøddaskaða. Tað bar við sær, at hann ikki var førur fyri at spæla, tá ið Coventry leygardagin tapti 2-1 á útivølli móti Sheffied United. Í gjár skuldi eykaliðið hjá Coventry spæla. Um Claus Bech Jørgensen ikki varð førur fyri at vera partur av liðnum, so varð í gjár tað roknað torført at ímynda sær, at hann fór at verða partur av føroyska ferðalagnum í Fraklandi.

Eftir ein tíma noyddist Jón Rói Jacobsen av vøllinum mikukvøldið, tá ið Frem vann 2-1 í steypakappingini móti Vejle. Sunnudagin hittust hesi bæði feløgini aftur í landskappingini. Úrslitið var 1-1, og Jón Rói var ikki á Frem liðnum. Fótliðsskaðin plágaði framvegis, men Jón Rói Jacobsen hevur gott mót:

- Nú er pínan burtur. Eg fái viðgerð hvønn dag, og eg vóni og rokni við, at eg verði førur fyri at spæla leygardagn, segði Jón Rói Jacobsen fyrrapartin í gjár. Hann og landsliðsvenjarin skuldu tosa saman í gjárkvøldið, og tá varð roknað við, at endalig støða skuldi takast til, um miðverjin verður førur fyri at luttaka í Fraklands ferðini ella ikki.

Hjá fleiri øðrum útisetum var spælitíðin ikki serliga long. Atli Danielsen hugdi at, tá ið Sogndal legði rygg til 4-0 tap á heimavølli. Teir mistu málverjan, sum fekk reytt kort, tá ið eitt korter var farið.

Súni Olsen spældi sjey minuttir hesa ferð. Fyri viku síðani var hann á vøllinum í eitt korter. Todi Jónsson var í ein tíma, áðrenn hann varð skiftur út, í einsamallari og harvið vónleysari álopsódn, tá ið Start í 4-5-1 uppstilling tapti 2-0 á útivølli.

Harafturímóti spældi Rógvi Jacosben allar 90 minuttirnar, tá ið KR fekk trý stig. Andrew av Fløtum var á vøllinum í 81 minuttir, tá ið Fremad Amager á heimavølli spældi 2-2 móti Køge.



*Saman við Jón Róa Jacobsen er Claus Bech Jørgensen nú eisini komin á listan yvir spælarar, sum eru ivasamir til stórdystin móti Fraklandi*